# Tórshavn fyrst og fremst

**Inga Dahl**
*Valevni Fólkafloksins til býráðsvalið*



Nógv er hent í Tórshavnar kommunu seinastu árini.

Her eru nøkur dømi:

Barnaansingartilboð, sum hevur verið ein stórur trupulleiki, er nú væl nøktandi.

Um skúlaviðurskiftini er at siga, at tey eru lutvís lógarbundin. Útbyggingar á skúlaøkinum hava verið og eru umfatandi.

Í Hoyvík og í Kaldbak er bygt aftrat, í Kommunuskúlanum verður bygt aftrat, Hoyvíkshøllin er komin, høll er í gerð í Kollafirði og harumframt eru fleiri byggingar ávegis.

Á vegakervinum eru stórar og neyðugar ábøtur gjørdar, vegir eru breiðkaðir, rundkoyringarnar bøta munandi um ferðsluna, umframt at nýgerðir eru á veg. Havnin má búgva seg til at taka ímóti allari ferðsluni, nú fleiri oyggjar skulu bindast saman.

Útstykkingar og byggingar eru gjørdar sum ongantíð fyrr. Tann størsta útstykkingin, sum nakrantíð er gjørd á Føroya landi, er við at koma undir land í Hoyvíkshaganum. Alt samalt sera neyðugt í einum býi, sum veksur so skjótt sum Havnin ger.

Kloakkirnar hava fingið stórar, alneyðugar og kostnaðarmiklar ábøtur.

Á eldraøkinum er nógv hent hesi seinastu árini.

Á Lágargarði eru gjørdar ábøtur, sum hava økt um virksemið, og sum hava bøtt munandi um støðuna hjá eldra ættarliðnum. Liðugtgjørdir døgurðar verða koyrdir út til hvønn krók í kommununi til nógvar pensionistar. Vælvirkandi dagtilboð er sett á stovn. Virksemið í ergo- og fysioterapiini er økt, soleiðis at eisini heimabúgvandi fólk fáa gleði av hesum tilboðum.

Tjarnardeild er byrjað at taka ímóti fólki. Har verða nógv og fjølbroytt tilboð.

Í Vallalíð skuldi eitt stórt heim staðið klárt nú, men sum vit øll vita bleiv hetta arbeiðið seinkað. Arbeiðið er nú farið í gongd aftur, men heimið verður tíverri ikki so stórt sum ætlað.

Í Hoyvík er eitt sambýli til 10 fólk.

Og her kunnu vit hóskandi nevna, at vit hava okkara góða gamla og vælvirkandi Ellisheim og Umlættingarheimið.

Eitt stórt framstig er tað nýggja dagtilhaldið við Dalavegin, væl stuðlað av býráðnum.

Tilboð um regluliga vitjan av sjúkrarøktarfrøðingi er til øll, sum hava fylt 75 ár. Eitt sera vælumtókt tilboð, uppsøkjandi við vegleiðing og ráðgeving.

Í Tilhaldinum í Tórsgøtu eru nógv og fjølbroytt tilboð til pensionistar. Hetta fyri at økja um vælveruna hjá fólki í aldurdóminum.

Pensionistafelagið ger eisini sítt til at bøta um tilveruna hjá teimum gomlu.

Skuldin hjá Havnar kommunu er niðurgoldin til næstan einki, samstundis sum allar útbyggingarnar eru farnar fram. Tað má sigast at vera eitt bragd.

Nógv kann verða sagt afturat. Men tað mest umráðandi er at arbeiða við opnum og positivum sinni, og at vit seta okkum stór mál at arbeiða ímóti, vælvitandi, at vit ongantíð náa málinum, tí tað flytur seg frameftir, so hvørt sum vit nærkast tí.

Tá er at seta sær nýggj og hægri mál.

Tað ætla vit okkum, vit sum eru á lista A.

# Tórshavn er ein mentanarlig perla

**Annika Olsen**
*Valevni Fólkafloksins til býráðsvalið*



Mangan verður havt á lofti, at havnafólk ikki hava nakra mentan, havnafólk eru býarfólk á ein neiligan hátt, havnafólk krevja alt ov nógv og fáa alt ov nógv í mun til onnur øki í Føroyum. Hesum vil eg vísa aftur. Fyri at taka mentanina fyrst, so er tað í Havn ein sera stór mentanarlig menning innan nærum øll øki. Havnin er mentanarligi metropolurin í Føroyum, har listin, tónleikurin, bókmentirnar, ítrótturin stendur í hægsta blóma. Fyri at mentanin í Havn ikki skal følna, er tað neyðugt, at stig verða tikin, so at henda menning kann halda áfram og gerast enn betur. Tað er millum ungdómin, at tónleikurin, listin og harvið øll okkara mentan fær íblástur, og tí er tað neyðugt, at ungdómurin fær bestu sømdir og karmar at virka undir. Tað eigur at verða eitt mentanarstað, har tey ungu kunnu bera fram tónleik, list, drama osfr., eitt mentanarstað, ið er eitt millumting millum Norðurlandahúsið og Margarinfabrikkina, sum setur ta eksperimenterandi listina og tónleikalistina í hásæti. Hetta er neyðugt fyri at halda lív í mentanarlívinum í Havn umframt, at tað kann varpa ljós á, hvussu nógv frálík mentafólk veruliga finnast millum ungdómin í Havn.

Tað var hugvekjandi, tá ið eg í farnu viku var á námsferð í New York við einum 2. HH flokki úr Handilsskúlanum á Kambsdali. Har vitjaðu vit millum annað býarpartin Harlem, har vit fingu eina gjølla frágreiðing frá einum lokalum íbúgva um, hvussu tað eksperimenterandi jazzumhvørvið birtist í Harlem í 1930 árunum og 1940 árunum, eitt jazzumhvørvi, ið uppfostraði mangar góðar jazztónleikarar. Her bleiv spælistað eftir spælistað sett á stovn, so at fólk kundu spæla og hoyra jazz. Henda jaliga bylgjan førdi við sær, at jazztónleikurin fór at blóma, og hevur hetta síðan givið tí amerikanska statinum búskaparligt íkast og góða reklamu og ikki minst, at hetta samstundis ríkaði um mentanarumhvørvið á staðnum.

Havnin hevur ikki ov nógv tilboð til tey ungu, ið hava áhuga fyri eitt nú tónleikalist. Havnin er í støðugum vøkstri og í dag búgva 40 procent av íbúgvunum í Føroyum í Havn, og tí er tað natúrligt, at Havnin eigur at hava eitt mentanarstað til tey ungu. Havnin er vorðin ein metropolur, ein perla í Føroyum, og vil eg gera mítt til, at mentanin fær bestu sømdir og karmar at virka undir.

# Vinnufjendskur óreinskapur

**Hanus Vang**



**Býráðs-Imperialisma 3. partur**

Tá Ongland (og Danmark) fingu sær hjálond bóru teir seg ikki altíð so dámliga at.

Á sama hátt er við býráðnum í Havn.

Síðani vit gjørdust "hjáland" hevur bóndagarðurin ikki fingið frið, men er forfylgdur við súltingum og tí sum verri er.

Í hesum valskeiði seta teir krúnuna á verkið, og hava givið neytahaldinum á garðinum mønustingin.

Føroya stórsti samanhangandi bøur til ein garð skal ætlandi brúkast til útstykkingar.

Soleiðis verður Vatnaskarðsbøur og Vatnaskarðssléttin kanska karmur um hópin av raðhúsum við reyðum taki!

Til tað endamál er Flatna-hagin væl egnaður, tí at Býráðið eigur allan hagan. Hann fingu teir til keyps í 1932 fyri 50000 krónur til Havnina at vaksa á. Men frætt er at býráðslimir ikki vita tað, sjálvt eftir mong ár har.

Í undanfarnu setu, 1996 til 2000, komu bóndin, golffelagið, Býráðið og avvarðandi myndugleikar ásamt um ein býarplan sum vardi bæði bø, sléttan, garðin og golf.

Men onkur má hava hildið at tá semja er um ein plan so er at broyta hann soleiðis at

Hoyvíksgarður kann oyðileggjast sum skjótast.

Onkur er enn so primitivur at grønur bøur má oyðileggjast fyri ein og hvønn prís.

Men tá fleiri hundrað fólk mótmæltu skjótivøllin í Sandvíkum, var tað nyttuleysari enn at sletta vatn á gás.

(Sí annars hjáprentaðu tekning úr "Helhedsplan for Tórshavn Kommune").

**FYRISPURNINGAR til TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ:**

1) Hví broyta tit býarplanin á Vatnaskørðum frá tí íð gjørt varð í semju til nú at oyðileggja garðin beinanvegin?

2) Hví geva tit neytahaldinum mønustingin nú, fyri eina villa framtíðarætlan íð kanska (vónandi) ongantíð gerst veruleiki?

3) Hvussu ber tað til at nærum onki skal byggjast á Argjum og í Flatnahaganum, meðan tit einans hugsa um at oyðileggja Hoyvíksgarð? Ella er alt eitt smáligt privat røraspark?

4) Hví ofrar Býráðið kanska eini tíggju miljónir til skjótivøll í Sandvíkum til eitt felag sum ikki eingang hevur havt aðalfund í mong harrans ár?

Vit eru fleiri ið vænta svar.

Týski filosoffurin Schopenhauer segði: "Tá fávitskan fær vald, artar hon seg til óndskap"

**kanska framhald.**



*Her er kortið ið vísir "Havnina ár 2022". Ikki sørt ósmæðið*



VIÐMERKINGAR

# Eitt virðiligt lívskvøld

**Jógvan Arge**
*Valevni fyri tjóðveldisflokkin til Tórshavnar Býráð*



**Av góðum grundum eru tey gomlu og óhjálpnu ein týðandi partur av valstríðnum til býráðið.**

Eldraøkið hevur verið afturúrsiglt í mong ár, tí tað hevur verið eitt býtisbarn millum landið og kommunurnar.

Eftir valgreinum at døma er undirtøkan í Tórshavnar kommunu fyri at gera nakað við eldraøkið nú so breið, at komandi býráð uttan himpr kann fara undir gerningin.

Vit í tjóðveldisflokkinum hava sett okkum fyri at nøkta tann bráðneyðuga tørvin á ellis- og røktarheimum í allari kommununi sum skjótast.

Vit leggja doyin á at nøkta ansingartørvin og bústaðartørvin við umlætting, dagtilhaldi og sambýlum eins og møguleikum fyri at flyta í lættari bústað.

Vit vilja gera eina miðvísa ætlan at tryggja óhjálpnum virðiligar umstøður á heimum ella heima við hús.

Vit miða eftir, at heimavitjanartænastan verður útbygd, og at tiltøk verða sett í verk, sum kunnu lætta um heima við hús.

Í grundregluni eigur landið alt eldraøkið, sum tað er, men tað hevur ikki hildið seg til at loysa uppgávuna.

Saman við eini ætlan um at leggja eldraøkið út til kommunurnar, legði tjóðveldisflokkurin í landsstýrinum til brots fyri at fáa gongd á.

Eftir trimum árum vórðu játtaðar um 60 mió kr til partvísa fíggjan av heimum og sambýlum. Hin partin skuldu kommunurnar fíggja sjálvar.

Hetta sæst aftur ymsastaðni, men tørvurin í Tórshavnar kommunu er so mikið stórur, at landsins íløgupartur neyvan fer at røkka til tær ætlanir, sum vit noyðast undir.

Vit fegnast um Tjarnargarð og komandi heimið fyri minnisveik, sum eru kærkomin stig á leiðini.

Men skal tørvurin nøktast, sum borgararnir í Tórshavnar kommunu hava, verður neyðugt at taka meiri rívan til, enn gjørt er.

Okkara partur skal ikki liggja eftir. Vit halda, at tað er ein mannarættur at fáa eitt virðiligt lívskvøld.

X við E.

# Kongshúsið letur hurðar upp og veitir fyrimunir

**Edmund Joensen**



Í hesum døgum verður seinasta hond løgd á at fyrireika stórfingna ferð til Japan.

Margreta drotning, vegna kongaríkið, stendur á odda fyri ferðini, sum umframt at vera ein almenn vitjan, eisini hevur til endamáls at vera eitt menningar-, ídnaðar- og søluátak av teim heilt stóru.

Ídnaðarfelagsskapir og handilsfelagsskapir í øllum Danmark standa í bíðirøðum, fyri at sleppa við í hesum stórbæra fylgi, hesi almennu vitjan, sum brýtur slóð fyri framburði og menning av øllum handa slag, ikki minst tá talan er um útflutning av vørum og tænstum.

Danmarkar ríkið hevur í heimshøpi, bæði millum minni og meir framkomin lond, eina høga stjørnu, sum ger slíkar ferðir og átøk møgulig. Føroyar og Grønland eru sjálvandi partar av øllum hesum.

Ikki er undarligt, at áhugin fyri at sleppa við er ovur honds stórur, sannast má at Japan hevur heimsins næststørsta búskap og hevur heimsins størstu valutagoymslur.

Tað skuldi undrað meg, um grønlendingar ikki av fullum huga vilja sleppa sær uppí part og útvega sær fyrimunir í sambandi við ferðina, bæði til frama fyri grønlendska vinnulívið og fyri grønlendska samfelagið.

**Hvar eru Føroyar í hesum sambandi**

Føroyar eru sjálvandi bodnar við í hesum tiltaki. Kongshúsið setur ongan eftir, og als ikki føroyingar. Tað hoyrist at landstýrið hevur fingið hesa inbjóðing. Men lítið ella onki hoyrist frá okkara landsstýri um fyrireikingar til at taka vinnuligan og politiskan lut í tiltakinum, fyri at skapa kunnleika um Føroyar, at skapa framburð fyri føroyskan handil og ídna, og í heila tikið fyri at víðka um sjónaringin hjá føroyingum.

Hvar eru okkara ídnaðarfólk í hesum spælinum? Er tað veruliga so galið, at landstýrið leggur seg oman á innbjóðingina? Um so er, er orðsøkin til at hon ikki kemur víðari gáloysni ella tað sum verri er? Verður forða fyri positivari føroyskari lutøka tí donsk og grønlendsk áhugamál eisini eru við og at Danmarkar Ríkið er felagsnevnarin?.

Livst so spyrst.

# Abort

**Nina Dahl**

At oplysning og prævention er det bedste, er der ingen, der kan være i tvivl om.

Vist kan man da få abort på Færøerne, hvis man er for ung, for gammel, hvis de økonomiske og sociale forhold taler for det – eller hvis der er mistanke om et alvorligt handicap, kort sagt, hvis man kan finde en passende historie – og hvis lægen samtykker – altså ikke en ens behandling, men vilkårlig alt efter lægens skøn – er det særlig etisk.

For lidt mere end et år siden ønskede daværende landstyresmand Bill Justinussen at stramme op om abortloven, eller rettere sagt, at loven skulle følges. Rigtig gang i debatten kom, da en københavnsk byrådspolitiker kaldte færingerne for de nordiske fundamentalister. Hvad får en dansk politiker til at tage det emne op, hvem ønsker, at han gør det? Der bor mange færinger i Danmark, mange unge i uddannelsesærinde, unge med en mening om det færøske samfund – mennesker, som ønsker at påvirke. Og hvorden gør man det? Igennem medierne. Men man må jo først have en nøgleperson.

Hvem lånte den danske politiker sin nationaldragt? – næppe nationalmuseet.

Selvfølgelig skal danske politikere ikke lovgive på Færøerne, det skal det færøske følk og dets valgte repræsentanter, men derfor kan andre være med til at sætte fokus på et emne.

Abortloven er fra 1956. Både samfundet og holdninger har ændret sig siden da. Tilbage står, at hvis en lov tolkes og bøjes og passes til, efter hvilken historie man kommer med, så er det bedre at aftage loven. Der må være samsvar mellem lov og praksis.

I Iran skal en 13 års pige stenes til døde efter at have født et barn, som hendes bror er far til. Broren er dømt til 150 piskeslag, som er det samme som dødsdom. Jeg håber, at nogen mener, at de har ret til at påvirke disse domme.

# Sum at geva plastikkblomstrum vatn!

**Marianna Heinesen**
*valevnið Tjóðveldisfloksins til Býráðsvalið*
*www.heinesen.fo/marianna/*



Nøkurlunda soleiðis úttalaði okkara táverandi borgmeistari, Poul Michelsen, seg um ungdómin í Havn miðskeiðis í 80'unum í sambandi við, at søkt varð um eini ungdómshús. Undirritaða var tanáringur tá og kanska ikki ein av teimum mest uppreistrarhugaðu, men hasi orðini gloymdi eg ongantíð!

Tá tosið fellur á ungdómin, eru vit enn sum fyrr von at hoyra orð sum 'forkelaði, dovin, tíma einki, bara krevja og krevja og brúka alt ov nógvar pengar! Tey hava rætt til 'ókeypis' skúlagongd, eru limir í nógvum ymiskum feløgum, ferðast dúgliga, vaksa úr klæðunum, sum júst eru keypt, og eta fyri fleiri! Jú, víst kosta tey okkum foreldrum nógvar pengar. Sjálvsagt er tað fyrst og fremst okkara ábyrgd, at børnini fáa ein góðan, tryggan og ikki minst sunnan uppvøkstur. Men í ungdómsárunum mugu vit eisini dúva upp á onnur og kunnu í tí sambandinum spyrja: Hvussu kann kommunan vera við at skapa góðar og sunnar umstøður?

Í mínari verð tykist tað, sum um vanligi hugburðurin í kommununi er: Vit geva teimum eini hús (Margarinfabrikkina) og seta so nøkur fólk, sum kunnu skapa umstøðurnar og ansa eftir, at alt gongur, sum tað skal. Einki ringt um tað og starvsfólkini har. Tey eiga nógv rós uppiborið. Men Margarinfabrikkin kann altso ikki hýsa ØLLUM ungdóminum í Tórshavnar kommunu! Vit hoyra t.d., at tað er eitt verri óskil, tá dj-show/diskotek er uppi í Badmintonhøllini! Meginparturin av ungdóminum undir 18 ár gongur fullur og ger ónáðir og enntá herverk..

Er tað kommunan, sum hevur ábyrgdina av tí??? Ein góður spurningur! Eg vildi meint, at kommunan kundi, við at varpa nógv meira ljós á ungdómin og tørvin hjá teimum, arbeitt fyri, at fáa ein sunnan og ábyrgdarfullan ungdóm. Ein ungdóm, har tey ungu sjálvi eru við til at skapa tær rammur og fyritreytir, sum eru júst fyri tey!!

Tjóðveldisflokkurin hevur í valskrá síni sett út í kortið at fáa orðað ein umgdómspolitikk. M.a. er málið, at ungdómshús verða tøk úti í nærumhvørvinum. Hesi umgdómshús skulu kunna brúkast til eitt og hvørt tiltak, m.a. sum dansihølir. Men tað týdningarmesta í hesum er, at ungdómurin sjálvur er við til at skipa fyri og sjálvur kann leggja lag á, hvat hølini skulu brúkast til!

At fáa nakað noytt inn á seg verður sum oftast ikki væl móttikið. At bara geva og geva og so vænta, at nøgdin kemur av sær sjálvari, er heldur ikki rætti hugburðurin! Ynskja vit ein vælvirkandi ungdómspolitikk, skulu nakrar treytir uppfyllast. Tey ungu í okkara størstu kommunu hava krav upp á at verða hoyrd og vird. Tað vil Tjóðveldisflokkurin heldur enn fegin arbeiða fyri, soleiðis at vit fáa ein virknan og sunnari ungdóm! Við røttum amboðum ivist eg onga løtu í, at kommunan fær tað fleirfalt aftur!